# Bók um Zacharias Heinesen

**Í sambandi við at Zacharias Heinesen í ár fyllir 70 ár er nýggj bók komin út um listamannin**

MYNDLIST

Bókin, ið hevur heitið ZH 06, vísir nýggjar síður av verki Zacharias Heinesens, og gevur innlit í ta lívs- og listaáskoðan, sum er støðið undir hansara arbeiði. Bókin peikar á nøkur aðalevni í hansara verki, men eisini menningina í hansara list.

Kendar og ókendar síður
Í bókini eru greinar eftir Gunnar Hoydal, Bárð Jákupsson, Kinnu Poulsen, Bent Irve og Inger Smærup Sørensen og myndir, sum ikki áður hava verið á prenti.
Bæði bókin umframt framsýningin í Listahøllini í løtuni eru gjørdar í samband við at Zacharias Heinesen í ár fyllir 70 ár.
Eins og framsýningin byggir bókin á týdningin, sum Zacharias Heinesen hevur havt fyri føroyska list. Zacharias Heinsen hevur við síni sermerktu innliving í landslagið, sínum sermerkta viðkvæmi í litunum og við sínum eyðkendu musikalsku strikum, gjørt myndina, sum er kend og elskað sum tann føroyska myndin. Men bókin vísir eisini meira ókendar síður av verki Zacharias Heinesens. Millum annað picassoíblástu tekningarnar frá hansara ungdómsárum, hansara áhuga fyri flatanum, linjunum og viðurskifti teirra sínámillum, og hvussu hann alt lívið hevur verið hugtikin av kubismuni og konkretismuni.

ave



*Nýggja bókin um Zacharias Heinesen vísir bæði kendan og ókendar síður av væl umtókta listamanninum*

# Eru føroyingar heimsins bestu fiskimenn

**Hesin spurningur verður svaraður, tá fyrsta altjóða havfiskikapping í Føroyum nakrantíð verður hildin í Runavík í døgunum 22.-24. august í ár**

FISKIKAPPING

Tað er Smyril Line, sum saman við Runavíkar kommunu og Greengate Incoming skipar fyri kappingini, har nakrir av heimsins mætastu havfiskarum fara at kappast um eina samlaða upphædd á 240.000 krónur.

Við orðunum "Nú er nokk reypað – nú er at prógva tað" bjóðar Smyril-Line øllum fiskiáhugaðum føroyingum at vísa, um vit nú veruliga eru so góðir fiskimenn sum vit halda. Í døgunum 22. august til og við 24. august er Smyril-Line vertur fyri Smyril Line International Sea Angling Cup, har havfiskarar úr Danmark, Hollandi, Noreg, Íslandi, Hetlandi, Skotlandi, Onglandi og Føroyum fara at kappast um stóru vinningarnar.

Vinningarnir hava eitt samlað virði á góðar 240.000 krónur. Teir størstu eru:

- The Champion – størsti fiskurin 73.000 kr
- The Pro – flest stig 73.000 kr
- Besta lið (4 fólk) 15.000 kr
- Besta kvinna – størsti fiskurin 7.300 kr
- Besti unglingi – størsti fiskurin 7.300 kr Stuðlað av Jógvan Weihe
- Besti skiparin 15.000 kr Stuðlað av Ferðaráð Føroya

Umframt hesar eru nógvir aðrir góðir vinningar, m.a. verður størsti fiskur hvønn dagin heiðraður.

Kappingin er skipað eins og aðrar altjóða kappingar av hesum slag. Farið verður út við bátum hvønn morgun og tað er skiparin ið avgerð, hvar leiðin gongur. Fiskast skal við tráðu og fiskitíðin hvønn dagin er 5 tímar, umframt siglitíð.

Afturat sjálvari havfiskikappingini verður eisini skipa fyri ymiskum tiltøkum á havnalagnum, har bátarnir koma inn. Hesi tiltøk eru fyri øll. Skráin sæst á heimasíðuni www.smyril-line.com, har eisini ber til at lesa meira um sjálva kappingina.

Tilmelding fer fram hjá Greengate Incoming, við at senda ein teldupost til kamilla@greengate.fo ella ringja á telefon 35 05 20. Luttøkugjaldið er 3.995 kr. Íroknað er luttakaragjald, fisk-ing í trígggjar dagar, bátur og agn.

Umframt luttakarar verða fleiri enn 10 altjóða havfiskabløð umboða á festivalinum.

Meira fæst at vita á www.smyril-line.com. Tú kanst eisini ringja til Smyril Line á 21 59 36, ella senda teldupost til seaangling@smyril-line.com

# Føroya Tele veitur nú eisini fría nýtslu á Breiðband

**Allir privatir breiðbandskundar hjá Føroya Tele fáa nú møguleikan at fáa sær fría nýtslu á breiðbandshaldi – tað sum eisini verður kallað »flatrate«**

BREIÐBAND

Føroya Tele hevur í dag 4 privat breiðbandshald til ymiskan tørv. Hesi hald hava øll frammanundan eina ávísa fría nýtslu og hevur hetta víst seg, at vera nøktandi fyri teir flestu kundar.

Til teir kundar, sum hava tørv á størri nýtslu enn hana, sum fylgir við haldinum, bjóðar Føroya nú fría nýtslu fyri eitt eykagjald um mánaðin.

Hevur kundin breiðband frammanundan, skal hann bert umskipa haldið til fría nýtslu. Ikki er neyðugt við nýggjum beinara ella montørvitjan. Einasta, sum krevst er at umbiða tænastuna á tel 808080 ella í einari av Telebúðunum. Stovningargjaldið er kr. 550,-.

Prísdømi: Fyri minsta haldið (256/128) er eykagjaldið kr. 120,- soleiðis at kundin tilsamans einans rindar kr. 279







**Skeið í reingerð**
*21 – 23 aug., 11 sep. og 18 sep.*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við reingerðarevnum, tólum og amboðum, umhvørvi og ergonomi. Mátingar og royndir verða gjørdar av ymiskum evnum, tilfari og amboðum. Í uppgávum verða útrokningar gjørdar, sum skulu vísa, um tað verkliga besta eisini er tað fíggjarliga besta.
Skeiðsleiðari: Kristianna Rein
Tilmelding innan 7 aug.

**Buffét**
*Skeið 1: 18. – 22. sep.,*
*Skeið 2: 25. – 29. sep.*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við at tilrættaleggja og at matgera til buffét'ir. Skeiðið er skipað soleiðis, at maturin, ið verður gjørdur á skeiðnum, verður serveraður fyri gestum. Skeiðsluttakarin fær innlit í reinførisviðurskiftir í einum stórkøki og ein varhuga av arbeiðsumhvørvinum í einum stórkøki.
Skeiðsleiðari: Martin Restorff
Tilmelding innan:
Skeið 1: 4 sep.
Skeið 2: 11 sep.

**Steinseting**
*16. – 20. okt.*
Á skeiðnum verður arbeitt við tekningum, góðskuni av arbeiðnum og undirlagið. Arbeitt verður eisini við eini praktiskari steinsetingruppgávu, ið verður eftirmett eftir DS 1136.
Skeiðsleiðari: John Hvass
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad innleiðsla**
*19. – 20. okt.*
Skeiðið er ætlað teimum, ið ikki eru von við at arbeiða við teldu. Á skeiðnum verður arbeitt við mús og knappaborði. Lært verður at starta forritið og at byrja eina nýggja tekning, um brúkaraflatuna, amboðs- og kommandolinjur og at skriva kommandoðir. Arbeitt verður við, at tekna einklar uppgávur.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad grundskeið**
*26. – 27. og 30. – 31. okt.*
Lært verður um funkurnar á 2D støði og tilrætta-legging av tekniuppgávum.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 6. okt.

**Beton armering**
*30. okt. – 3. nov.*
Undirvíst verður í grundleggjandi vitan um eginleikarnar á jarnbetongi, trekk og trýstviðurskiftir, ymisk sløg av armeringum, krøvum til bukkidiametur, betongløgum, støðlongdum og ankring. Arbeitt verður við at tilevna og seta vanliga armering eftir tekning.
Skeiðsleiðari: Heðin Gásadal
Tilmelding innan 16. okt.

**Innleiðsla í sveising**
*6. – 17. nov.*
Skeiðslutakarin arbeiðir við einføldum sveisistøðum við elektrodu, gass-, TIG, MIG/MAG-sveisiháttunum. Endamálið við skeiðnum er at læra á grundleggjandi støði um sveising, sveisiteori, umhvørvi og trygd og nýtslu av tólum og amboðum.
Skeiðsleiðari: Jeffri Olsen
Tilmelding innan 23 okt.

**Make Up skeið**
*Skeiðið er skipað yvir 8 kvøld, mána- týs- miku- og hóskvøld frá kl. 19 til 22 í døgunum 5. til 15 feb.*
Evnini á skeiðnum verða: húðanalysa, andlitsformar, litlæra, dag make-up, kvøld make-up, brúðar make-up og "smokey eyes"
Skeiðsleiðarar: Sunneva Thorsteinsson og Unn Zachariassen
Tilmelding innan 22 jan.

www.skeidsdepilin.fo
tilmelding á heimasíðuni
ella á telefon 318 813